# Teir falnu fáa sín m

**Mykines er ein av bygdunum sum hevur havt sínar falnu – bæði á sjógvi og í bjørgum. Seinni í summar fáa allir hesir 37 menninir umsíðir sín varða. – Tað hevur sín stóra týdning fyri bygdina at hava ein slíkan minnisvarða, sigur Eddie Lauritsen í Mykinesi**



## Minnir



**Snorri Bend**
snorri@sosialurin.fo
mynd: Jens Kristian Vang

**Mykines**: - Tað var vist í tøkum tíma, at vit fóru undir at endurreisa minnisvarðan, sigur Eddie Lauritsen, sum er ein av trimum Mykinesmonnum í nevndini at fáa hetta framt í verki.

Saman við Jákup í Løðu og Esbern í Eyðansstovu hava teir skipað so fyri, at minnisvarðin er endurreistur á sama staði, sum hann hevur staðið í sløk 60 ár.

Her hevur hann staðið á veðurringum staði síðani í 1939. Nú var hann so illa farin av frosti og regni, at eingin ella fá kundu síggja, hví hann stóð her og hvat endamálið var við hesum laðaða steininum, og uttan nakrar minnisplátur, ovarlaga í bygdini.

Men teir tríggir Esbern, Eddie og Jákup vildu tað øðrvísi. Fyri teir og mong onnur hevði tað stóran týdning at minnast teir Mykinesmenn, ið vóru farnir á sjónum og í bjørgunum.

- Gjørdu vit ikki nakað við at fáa minnisvarðan aftur, var vandi fyri, at hann fór at detta niður, sigur hann.

Arbeiðið er nú liðugt, og verður minnisvarðin vígdur í næsta mánaði.

### Sorgarárið 1934

At fáa ein slíkan minnisvarða til eina lítla bygd, tekur sjálvandi sína tíð. Í roynd og veru byrjaði arbeiðið longu miðskeiðis í 30'unum.

Hetta hendi eftir sorgarárið 1934, tá sluppirnar Nólsoy og Neptun gingu burtur. Sluppin Neptun sakk undir Íslandi av einihvørjari ókendari orsøk, møguliga av samanstoyti. Við henni fórust ikki færri enn níggju mans úr 17 árum upp í 50 ára aldur úr Mykinesi.

Henda hendingin kom sera dátt við í bygdini, og stutt eftir varð avgerð tikin um, at ein átti at fáa endurreist minnisvarðan fyri teir farnu á sjónum.

Tá menn so fóru undir at fyrireika eina endurreisn av minnisvarðanum, varð avgerð tikin um at víðka um nøvnini á plátunum.

- Vit ynsktu eisini at fáa teir við, sum vóru falnir í bjørgunum. Hesi árini eru 37 mans farnir her, greiðir Eddie Lauritsen frá.

### Fallin minnisvarði

Arbeiðið uppá minnisvarðan byrjaði eftir at bygdarfólkið var komið fyri seg aftur eftir stóru vanlukkukkuna. Í 1939 stóð minnisvarðin klárur at verða vígdur av føroyskum presti.

Tað vildi tó so illa til, at eingin føroyskur prestur var í landinum um hetta mundið, uttan Jákup Dahl, próstur. Men hann var sjúkur, so her gjørdist einki beinanvegin.

- Tá søgdu mykinesmenn, at tað skuldi so eingin danskur prestur víga teirra minnisvarða. Og tí varð hann ikki vígdur tá, og er tað heldur ikki enn, greiðir Eddie frá.

Fyri nøkrum árum síðani tóku teir tríggir – Esbern, Jákup og Eddie – stig til at fáa henda nú so snotuliga minnisvarðan endurreistan og síðani vígdan.

- Ja, tað var neyðugt at gera nakað við minnisvarðan. Einki er gjørt við hann øll hesi mongu árini, og nú var hann næstan dottin niður.

- Tað vildu vit ikki hava sitandi á okkum, sigur hann.

### Fleiri nøvn

Tað eydnaðist teimum trimum ídnu mykinesmonnunum at fáa fólk at taka minnisvarðan niður og laða hann uppaftur. Hetta arbeiðið var liðugt fyri tveimum árum síðani.

Ein partur av arbeiðinum við endurreisnini var avgerðin um, hvussu minnispláturnar skuldu síggja út. Semja var um, at rættast var at fáa nýggjar og dagførdar plátur á minnisvarðan.

Tær gomlu pláturnar við nøkrum nøvnum á eru úr skifer og hava hanga nú í Mykines kirkju. Hildið var rættast at fáa aðrar og størri plátur til øll nøvnini, sum skuldu skrivast á.

Fyri einum mánaði síðani komu tær nýggju pláturnar til landið og vórðu settar upp við minnisvarðan – ein pláta við teimum, ið eru farnir á sjónum og ein við nøvnunum á teimum sum eru falnir í bjørgunum.

Á minnisplátunum sæst, at fyrsti mykinesmaðurin fórst á sjónum í 1884 og tann seinasti í 2002. Árið, tá fyrsti maðurin fórst í bjørgunum var í 1757 og tann seinasti í 1963.

### Bispur skal víga

Tað er sjálvandi kostnaðarmikið at fáa endurreist ein slíkan minnisvarða, og her hava teir fingið sera góðan stuðul frá nógvum ymiskum støðum.

Serligan stuðul hava teir fingið frá Lions-felagnum í Vágum og Atlantsflogi, sum við tyrlu hevur flogið alt tilfarið út higar ókeypis.

- Tá so tómt var í okkara kassa, tók Sørvágs kommuna yvir ta seinasta arbeiðið við minnisplátunum, greiðir Eddie frá.

Nú verður bert bíðað eftir at núverandi bispur okkara, Jógvan Fríðriksson skal koma út til Mykinesar.

Sum skilst er ætlanin, at hetta skal verða einaferð í juli mánaði.